**TELDA**
v/ 15" skermi, 484, 6.6 mHz, ljóðkort v/ hátalarum, 16 mb ram Windows 95, 1.24 nálaprintari, modem t. internet.
Tlf. 444619 ella gsm 218619, 220118

**TELDA**
K6-2 400 mHz, 64 MB RAM, 6,4 GB HD, 17" skerm, 56K modem, nógv fylgir við. Prísur 8.000 kr.
Tlf. 216676

## Tónleikur

**BILSTEREO**
til sølu. Ein Philips fløguspælari RC 628 til sølu fyri einans 1.800,- kr.
Tlf. 313738

**EIN**
Maison bassur við 4 str. til sølu og ein Marlin guitar, fer fyri hægsta boð.
Tlf. 441401

**EIN VÆLHILDIN 5 STREINGJA**
Banjo av slagnum Washburn til sølu fyri 4.000 kr. Kuffert fylgir við.
Tlf. 314384 & 286653

**EIN VÆLHILDIN MANDOLIN**
av slagnum Aria til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 314384 & 286653

**FORSTERKARI**
Ein Sony integreraður Digital Dolby surround forsterkari 4x110 w og 2x15 w og eitt sett av Jamo Bx 200 hát. 380 w, fyri 4.000 kr. ella hvør sær.
Tlf. 220744

**MARANTZ**
2x10 bånds equalizer med spektrum analyzer. Marantz båndoptager, samlet 2.500,-
Tlf. 319868

**TIL SØLU**
Ein bass kanón av slagnum JBL, lítið og onki brúkt. 200 watt ps til bil, 2.000 kr.
Tlf. 422358

**TRUMMUSETT**
ynskist til keyps. Alt hevur áhuga.
Tlf. 211288 ella 314610

## Ymiskt

**12. MAÐUR!**
Vit hava fingið nýtt tlf. nr. sum er: 213212.
12. maður, tlf. 213212

**AKVARIUM**
Eitt akvarium 60x25x35, við tilbehoyr og við ekstra pumpu, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 319912

**APEX FERÐASEÐIL**
til Keypmannahavnar og aftur til sølu fyri 2500,- Skal nýtast áðrenn 7. sept. ár 2000.
Tlf. 333955

**ARKIVSKÁP**
Er onkur, ið hevur eitt arkivskáp bíliga til sølu.
Vinaliga ringið á tlf. 313738

**VIDEOFILMAR**
til sølu.
Tlf. 456667

**CREAMY**
Hevur onkur 1 til 4 billettir at selja okkum, so vinarliga ring
tlf. 457936

**EG HAVI**
telefonkort frá umleið 80 londum býti um við føroysk telefonkort. Eg keypi fegin føroysk og íslendsk telefonkort (brúkt) Góður prísur verður givin.
Tlf. 086 150 140

**YNSKIST**
Kamin, umleið 4m ynskist.
Tlf. 315062

**FARTELEFON**
A.P. Philips 450 MHZ til fastmontering í bil ella bát til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 218778

**FARTELEFONIR**
NMT 450 og NMT 900 bíliga til sølu. Ymist tilhoyr er við í prísinum.
Tlf. 282116

**FØROYA TELE-CUP**
Innandurakapping í fótbólti fyri menn, 16 ár og eldri verður í Ítróttarhøllini í Runavík vikuskifti 5. til 6. febr. tilmelding á 448274/ 448068 frá kl. 20.00 til 21.00, seinasta freist er 3. febr.
B68 fótbóltur

**GARAGUHURÐ 3,10X2,10**
við fjarstýring. Kr. 6.000. Páhangsmotorur, Johnson 5HK, kr. 5.000 og eitt køliskáp 700 kr.
Tlf. 315062

**KOMPLET**
antik kgl. postalín »Frisenborg« 12 pers. til døgurða og kaffi, prísur 15.000,- Antik bestik »Rio« 12 pers. til døgurða/kaffi, 12 pers. prísur 15.000,-
Bill.mrk. 792762

**KUBBAKAPPING**
Árliga innandurakappingin hjá Skála Ítróttarfelag fyri yngru deildirnar verður 5. og 6. feb.
Skála Ítróttarfelag

**KØLIREOL**
við externum kompressara til sølu. Breidd 250 cm. hædd 200 cm.
Tlf. 315528

**LORVÍKSINGAR**
Í samb. við »Sólarkaffi« 13.2. verða »Gamlar myndir« frá seinasta ári aftur at síggja. Um onkur hevur eldri ella yngri áhugaverdar myndir um útróður, fiska-/sildaarbeiði ella sovornar sum hava við fiskivinnu at gera, gerið so væl at siga Áslak, Hákun ella Jógvan Elias frá áðrenn 5.2.
Bygdarhúsfelagið

**MÍN BESTIKSAMLING**
»Liss« (rustfrítt stál 18/10) bleiv ongantíð fullfíggjað og er tí til sølu. Er ongantíð brúkt.
Tlf. 444260 eftir arb. tíð

**MOTOROLA**
NMT 900 fartelefon ringir og ristir, vanligur ladari, borðladari og til bil, til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 333445
ella 211445

**NOKIA 5110**
GSM, gulan ella svartan front, leður-euti, bara 1000,- kr.
Tlf. 212212

**ÚTSØLA**
Hjá Torgerð Suðuroy Áarvegur 14
Gull-silvur
(eisini til før. búnan) gávulutir-antik, møblar o.a. alt til 1/2 prís.
sp/f Alvi Áarvegur 14 Tlf. 319546

**VINDEYGA**
v/ termorúti std. 120 cm. br. og 150 cm. h. kann avheintast fyri 1200 kr.
Tlf. 282116

**YNSKIST**
Snikkarabonkur ynskir til keyps.
Tlf. 321343

# Partarnir mangla siðvenju og reglur til at loysa trætur

*Fríggjadagin var Arbeiðsmarknaðardagurin og umrøðuevnið á degnum vóru sáttmálasamráðingarnar, og endamálið var, í felag, at finna fram til ein betri og møguliga annan samráðingarhátt enn tann, sum higartil hevur verið nýttur, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi*


Nevnd Starvsmannafelagsins
savnsmynd

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum verður greitt frá, at nevndir fyri arbeiðstakara- og arbeiðsgevarafeløg vórðu bjóðaði at luttaka á degnum. Undirtøkan var stór við 150 fólkum, umframt teimum, sum løgdu fram.

Dagurin byrjaði við at Jógvan Jespersen bjóðaði vælkomin og greiddi frá degnum. Síðani greiddu partarnir á arbeiðsmarknaðinum frá sínari fatan av fyrimunum og vansum við verandi samráðingarskipan, og teir hugleiddu eisini um, hvussu samráðingarnar betur kunnu skipast.

Thomas Magnussen, deildarstjóri á lønardeildini í Fíggjarmálastýrinum, segði, at tað eru 32 sáttmálar á tí almenna økinum, sum lønardeildin fyrisitur. Hann helt, at tað eru ov nógv feløg. Hetta er sera tíðarkrevjandi og minkar um teirra møguleika fyri at menna og viðlíkahalda sáttmálar. Hann segði eisini, at tað bara er tað eina felagið, sum ger tann fyrsta sáttmálin, sum hevur ávirkan á lønarkarmin.

Av serligum trupulleikum vísti hann á, at semingslógin ikki er galdandi fyri tað almenna, og at partarnir mangla siðvenju og reglur til at loysa trætur í sáttmálaskeiðnum. Visiónin hjá Lønardeildini fyri komandi samráðingarnar er, at samráðingarnar eru við eitt meginfelag ella felagssamráðingarnevnd.

### Tungar og torførar

Gunnleivur Dalsgarð, formaður fyri Starvsmannafelagnum segði m.a., at allir partar eru uttan iva samdur um, at sáttmálasamráðingarnar tey seinastu árini hava verið serstakliga tungar og torførar, og at ábøtur mugu gerast. Hann vísti á, at høvuðsorsøkin til, at samráðingarnar gingu illa og tóku alt ov langa tíð, er, at samráðingaruppleggini í nógvum førum vóru alt ov vánalig og ov illa fyrireikaði, - hetta ger seg fyrst og fremst galdandi á almennu arbeiðsgevarasíðuni, men eisini í ávísan mun á fakfelagssíðuni.

Hann helt, at tað er umráðandi og neyðugt, at samráðingarnar verða meira skipaðar, tí nógv av málunum eru av felags áhuga og týdningi fyri fakfeløginitil dømis arbeiðstíð, frítíð v.m. Samstarvið millum feløguni eigur at útbyggjast til eitt „samráðingarráð“, sum skal savna allar upplýsingar frá øllum fakfeløgunum soleiðis, at tey krøv og ásetningar, sum eru felags, kunnu samskipast og skapa grundarlag fyri einari felags sáttmálaáseting, har áhugamálini eru samanfallandi. Samstundis skal hetta ráð eisini loypandi verða kunnað, meðan samráðingar hjá teimum ymsu feløgunum fara fram.

### Órímiligt lutfall

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, vísti á, at tað er órímiligt lutfall millum samráðingar og lítla samfelag okkara, og at tað ofta eru stórar samráðingarnevndir, og tí truplari at finna eina semju. Trupulleikin er eisini, at samráðingarnar ofta ikki byrja fyrr enn beint áðrenn „deadline“, og at tað ikki eru verðuligar royndir at finna loysnir innan semingsstovnurin kemur uppí.

Hann mælti til skipaða ætlan fyri samráðingunum, og at tað verður eitt realistiskt tal av broytingum/økjum, ið verða viðgjørt. Somuleiðis at øll krøv skulu vera endaliga løgd fram í góðari tíð, og at at krøvuni skula verða grundgivin og realistisk. Harafturat mælti hann til høvuðsavtalur ella reglur fyri skipaðari uppsøgn av sáttmála og broyttar reglur fyri seming. At enda mælti hann til, at báðir partar vísa størri samráðingarvilja og tora at taka ábyrgd, at allir partar semjast um at seta ein bólk at fáa skipaðar karmar fyri samráðingar og meira samstarv í tí dagliga.

### Ikki stundir

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag segði, at størsti vansin við verandi skipan er, at verulig gongd ikki kemur á sáttmálasamráðingarnar fyrr enn sáttmálin er við at fara úr gildi, og hetta merkir aftur, at partarnir í veruleikanum ikki hava stundir út í æsir at viðgera tey sáttmálakrøv, sum liggja á borðinum. Hetta ber í sær, at ofta verða sáttmálaorðingarnar alt ov illa orðaðar.

Og júst hetta við at hava veruligar stundir at samráðst er kanska tað mest týdningarmikla, tá ið tosa verður um, hvussu samráðingarnar betur kunnu skipast, helt Ingeborg Vinther. Víðari segði hon, at tað uttan iva vildi lætt um sáttmálasamráðingarnar um nærri samstarv var millum fakfeløguni, og at man kundi gjørt meira við hetta, at ein ella tveir persónar frá hvørjum av pørtunum tóku upp serligar spurningar, og síðani løgdu fyribilsúrslit teirra fyri teirra felag.

### Ov ofta

Seinnaparturin byrjaði við John Rajani, sum vísti á trupulleikarnar í dag: Partarnir hava ov fáar realitetssamráðingar, áðrenn biðið verður um at fáa semingsfólk uppí og at ov lítil samskipan fer fram, tá samráðst verður. Hann helt, at semingsfólk verða boðsend ov ofta, og at vandi er fyri at broytingarnar í sáttmálunum ov ofta eru fáar og oftast snúgva seg um upphæddir, og at ov nógv tíð verður brúkt til sáttmálasamráðingar.

John Rajani spurdi, hví støðan er so: Um talan um ein vana sum er ringur at koma burturúr? Um arbeiðsgevarafeløgini eru ov veik, tá talan er um samráðingarsamskipan? Um verkamannafeløgini eru smá kongaríki, ið helst ikki vilja samstarva hvørt við annað?

Av tilmælum mælti hann til, at semingsmannaskipanin eigur at fevna um allan arbeiðsmarknaðin, og at reglurnar um val av semingsmonnum og tal av semingsmonnum eiga at verða broyttar. Víðari segði hann, at reglur eiga at verða fyri, hvussu semingsmenn skipa arbeiði sínámillum, reglurnar sum áseta tíðarskeiðið, ið semings-maður kann leingja sáttmála, eiga at verða broyttar, reglurnar um uratkvøðugreiðslu eiga møguliga at verða broyttar og møguleikin fyri at binda saman fleiri semingsuppskot eigur at verða kannaður.

### Niðurstøða

Frá bólkaarbeiðinum vórðu hesar niðurstøður gjørdar: Nei til meginfeløg, men samstarv, samband og samskipan er neyðug. Arbeiðsgevarin eigur at økja sína realitetsfatan av, hvat liggur í krøvunum hjá fakfeløgunum. Samráðingarnar skulu snúgva seg um lønarviðurskifti, skipan av arbeiðstíð - frítíðarviðurskifti, eftirútbúgving, seniorpolitikk, høvuðsavtalur og eftirlønarviðurskifti. Samráðingarnar enda við semingsmonnum, tí at tað verður byrjað ov seint, endaligu krøvuni koma ov seint, manglandi virðing, manglandi samskipan millum feløgini og órealistisk krøv. Víst var eisini á, at nevndirnar eru ov illa fyrireikaðar, manglandi ábyrgdarkensla (frá báðum pørtum), ótti fyri at taka tungar avgerðir og ov lítið álit partanna millum. Viðv. høvuðsavtalum kundi stór ósemja staðfestast.



nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

## Heilsanir



***Gó›i Kjartan***
Eitt stórt tillukku vi› 6 ára degnum. Vit gle›a okkum til ein gó›an og stuttligan fø›ingardag.
***Kærar heilsur til tín***
***frá mammu***
P.S. Hetta var ein gó›ur síladagur í Sumba



***Gó›u omma og abbi***
Hjartaliga tillukku vi› degnum 1. feb. og 24. jan. Vóni at tit fáa nógv gó› ár afturat. Takk fyri at tit eru so gó› vi› okkum.
***Heilsan Bogi og Bár›ur***



***Gó›a Susan***
Takk fyri í summar, ta› var hugnaligt. Hjartaliga tillukku.
***Heilsan nøkur vinfólk***

## T¿kk



Vit vilja takka øllum teimum, sum á ymiskan hátt gjørdu brúdleypsdag okkara, tann 24. juli 1999, ógloymandi. Gott n‡ggjár.
***Heilsan Marita & Rúni***



***Gó›i abbi***
Hjartaliga tillukku vi› tí runda degnum 1. feb. Her liggi eg gott. Eisini tilllukku til ommu vi› degnum, i› var 24. jan. Takk fyri at tit eru so gó› vi› meg.
***Heilsan Mariann***




***Gó›i Jóhan***
Hjartaliga tillukku vi› 21 ára degnum 29. jan.
***Kærar heilsanir tín xxxxx***
P.S. Ert tú vakna›ur nú?



***Gó›i Tummas abbi***
Hjartaliga tillukku á 65 ára degnum, sum var leygardagin.
***Ynskja tínir 6 abbasynir***



**nøvn nú** 5 ferðir um vikuna 25,- kr.

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..........................................................
Bústaður: ..........................................................
Bygd/býur: .......................... Tlf.: ..............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«